# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**Brúdleyp**
Í morgin 17. desember kl. 13.00 giftast í Betesda í Klaksvík Eydna Ljósheim, Tórshavn og Johnleiv Thomsen, Klaksvík. Aftaná vígsluna frá kl. 14.00 til kl. 18.00 verður opið hús í kjallaranum í Betesda. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Í morgin 17. desember giftast Frida Sigmunds-dótt-ir og Eddie H. Joensen, Kollafjørður. Vígslan verður í Adventistakirkjuni kl. 13.00. Opið hús verður í Bygdarhúsinum í Kolla-firði frá kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 421025, 506668 ella 580461 áðrenn 4. desember.

Í morgin 17. desember kl. 12.00 giftast í Nes kirkju Dorith Æðustein Poulsen, Havn og Niclas Allan Danielsen, Toftir, eru búsitandi í Rituvík. Veitslan verður hildin á Svangaskarði kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 449074 ella 749074 áðrenn 8. desember.

Sunnumorgunin 18. desember kl. 9.00 giftast í prestagarðinum í Lamba, Eyðdis Nielsen úr Saltangará og Eyðun Niclasen frá Gøtugjógv. Reseptión við kaffi og køkum, verður í Sjókaféini í Runavík millum kl. 15.00 og 18.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 6. desember høvdu Jónfríð og Alvi Hjelm, Vágur, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima 17. desember millum kl. 12.00-18.00.

Týsdagin 13. desember høvdu hjúnini Áshild og Petur Henry Kristiansen, Fuglafjørður, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fyri innbodnum leygardagin 17. desember kl. 18.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 18. desember hava hjúnini Jolina og Torleif Bech, Porkeri, gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru hjartaliga vælkomin í heimið millum kl. 13.00 og 18.00.

Sunnudagin 18. desember hava hjúnini Sonja og Poul Julius Michaelsen, Kunoy, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin hjá soninum Jógvan Suna frá kl. 16.00-20.00. Øll eru hjartraliga vælkomin.

## Miu Kjærbæk úr Vestmanna til minnis

**f. 30. apríl 1969 - d. 26. september 2005**



*Morgnar*

*Eg sum morgnarnir vitja*
*við sjógvi og oyggjum og lofti*
*eri um nøkur ár*
*ella fyrr*
*ikki til*
*Eri sum óføddur*
*eri sum ógitin.*

*Eg havi kent fólk*
*sum høvdu dýrar morgnar*
*við lívsins fylling og virði*
*fólk sum gingu við deyðanum í hondunum*
*og sum vistu tað*

*Vart tú førur at veita øðrum morgnar*
*sum minnast?*

Chr. Matras

Góða Mia
Ongantíð verður tú sum ófødd fyri okkum starvsfelagar í heilsufrøðiskipanini. Tú komst til okkara sum nýútbúgvin heilsufrøðingur summarið 2001, og arbeiddi til tú fórt frá til barnsburð á vári í 2002. Hvørki tú ella vit vistu tá, at tað bert var ein stokkut tíð, tú hevði eftir her. At tín tíð kom, ikki um nøkur ár, men fyrr, sum yrkjarin sigur. Tú gleddi teg til triðja barnið, og vit gleddust við tær.

Góða Mia
Tú hevði dýrar morgnar við til okkara. Tú skapti lív og gleði har tú komst. Sjálvt um tíðin bleiv stutt, so setti tú tær varðar. Eisini brúkarar okkara minnast teg. Tá vit hoyra: "Mia var her", so er tað altíð við virðing og takksemi, tað verður sagt. Eins og brúkararnir, so minnast vit teg við takksemi, vit minnast tín opna favn, tá tú segði: "kom, læt meg geva tær eitt klemm".

Góða Mia
Eisini tá tú gekk við deyðanum í hondunum, livdi tú. Sjálvt um tað var svárt at fara frá arbeiðinum, so valdi tú tíni kæru. Tey skuldu eiga síðstu tíð tína. Vit minnast seinasta dagin, tú vitjaði á skrivstovuni, hvussu ringt tað var hjá tær at siga farvæl. Hetta var títt ynskistarv. Men nú hevði familjan størri týdning. Sjálvt tá megnaði tú at rætta út eftir hjálp: "kom, gev mær eitt klemm".

Góða Mia
Tú vart eitt av menniskjunum, yrkjarin skrivar um. Tú gavst ikki bara okkum dýrar morgnar at minnast. Vit vita at døturnar, maðurin og familjan annars, hava góð minni um teg. Men vit vita eisini, at tá vit tosa um mammu, konu, dóttir og systir, vin og starvsfelaga er ikki altíð nóg mikið við minnum. Tað vilja koma tíðir, har vit ynskja: "gævi tú var her hjá okkum."
Nú ert tú hjá tí Jesuspápa, tú vendi tær til her. Og er tað til hansara, vit nú kunnu venda okkum, og soleiðis eisini í ár, ynskja hvørjum øðrum eini gleðilig jól.

Góða Mia
Nú er tað upp til okkara, at geva øðrum morgnar verdar at minnast. Tú gjørdi tað tú kundi sum fyrimynd.

Við djúpastu samkenslu við tykkum, Báru, Herborg, Svannu og Hjartvarði, foreldrum og syskjum, lýsa vit frið yvir okkara góða starvsfelaga Miu Kjærbæk.

**Starvsfólkið í Heilsufrøðiskipanini**

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu,
tá kæri maður mín

**Eyðfinn Tummasarson Jakobsen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum mongu, sum á ymiskan hátt
stuðlaðu og vístu mær samkenslu við uppringing
og vitjaðu inn á gólvið.
Tøkk til tykkum, sum lótu peningagávu til Láargarð
og blómur og krans.

Ein hjartans tøkk til tykkum á Láargarði,
sum vóru um hann, ta stuttu tíð, hann var har.
Tøkk fyri hjálpina til ervið.
Tøkk til berarar, sangarar og talarar.

Eina hjartans tøkk og gleðilig jól.

**Sonja**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust meg á 85 ára degnum tann 30. mai 2005.

**Blíðar heilsanir**
**Sigurd Joensen**

Somuleiðis ynskja vit familju, vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Blíðar heilsanir**
**Aðalbjørg og Sigurd Joensen, Oyndarfjørður**

## Dagurin

**17. desember. Albina**, deyð umleið ár 250. Ung kvinna, sum varð tikin av døgum, tá ið Decius keisari ráddi.

**18. desember. Gratianus**, deyður umleið ár 300. Biskupur í Tours í Fraklandi. Varð tikin av døgum, tá ið Diocletianus ráddi.

**19. desember. Nemesius**, deyður umleið ár 250. Um halga mannin Nemesius sigur halgisøgan, at hann einaferð varð lagdur undir stuldur. Men tá ið hann kundi prógva, at hann var ósekur, varð hann ákærdur fyri at vera kristin og tikin av døgum.